# FM í hálvum Marathon í Havn

**Leygardagi komandi verður skipað fyri kapping í hálvum marathon í Havn**

RENNING
*tíðindaskriv*

Nú verður høvi hjá rennarum at royna seg á einum av teimun longri teinunum, tá Ítróttarfelagið Bragdið skipar fyri kapping í hálvum Marathon leygardagin 3. mai. kl. 14.00. Teinurin sum er 21,1 km. langur, byrjar og endar á Bursatanga. Umframt at renningin leygardagin er FM-kapping er hettar eisini ein opin kapping. Tað merkir at øll, sum halda seg til, eru vælkomin at luttaka. Kappingina í fjør vann Cecil Weihe hjá monnunum við tíðini 1 t. 16 min. 55 sek. Hjá kvinnunum vann Rigmor N. Arge við 1 t. 29 min. 57 sek. Í ár verður kappast í fleiri bólkum. Menn, kvinnur og eisini verður kapping fyri veteranar hjá báðum kynum. Veteranar í hesum føri merkir tey, sum eru 45 ár ella eldri.

Teinurin sum skal rennast leygardagin er á sløttum, so møguleikarnir eru góðir hjá rennainum at fáa eina góða tíð.

# Skaddir klaksvíkingar

**Hvørki Allan Joensen ella Jákup Mikkelsen tóku lut í seinna dystinum móti Kasakhstan**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Tað gekk ikki heilt eftir vild, tá føroyska fótbóltslandsliðið fyrireikaði seg til seinna dystin móti Kasakhstan. Ein av ætlaðu broytingunum var, at Jákup Mikkelsen hesa ferð skuldi verja málið, eftir at Jens Martin hevði verið seinasta skansin í fyrra dystinum, men hetta varð so av ongum. Undir venjing endaði ein hendiligur samanstoytur við, at Jákup meiddi sær fingurin, og sá hann seg ikki føran fyri at taka lut í dystinum týsdagin. Tað merkti, at Jens Martin enn einaferð slapp at vísa sínar dygdir fyri landsliðsvenjaranum, meðan Bárður Johannesen úr HB varð innkallaður sum eykamálverji. Tó uttan at koma á vøllin.

Ein annar klaksvíkingar, Allan Joensen, mátti eisini geva avboð vegna skaða. Hann fekk ein lítlan snudd undir venjingini hjá liðnum, og var tí ikki annað enn vanligur áskoðari, tá 2-1 sigurin varð togaður í land.

# Kvinnulandsliðið úttikið

**Tað er nú avgjørt, hvørjar tær 12 verða, sum skulu verja flogbóltsgullið hjá Føroyum á komandi oyggjaleikunum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Flogbóltslandsliðið hevði seinastu úttøkuvenjingina um vikuskiftið, og eftir hesa skuldu venjararnir báðir, Niclas Joensen og Romica Øster, gera av, hvørjar tær 12 skulu vera, sum fara at umboða Føroyar á Guernsey. Teir báðir leggja dent á, at talan so avgjørt ikki var um nakra lætta uppgávu, og tað er í øllum førum at fegnast um, at kappingin um plássini á landsliðnum er somikið hørð. Rúm er tó bara fyri 12, og tí mátti nøkur vónbrot gevast, tá úttøkuboðini vórðu latin.

Umframt Oyl-luttøkuna, so er ætlanin hjá Flogbóltssambandinum eisini, at kvinnulandsliðið skal taka lut í evropeisku kappingini í C-bólkinum. Nær hendan kappingin verður, er enn ikki endaliga fastlagt, men talan verður um dystir annað hvørt seint í hesum árinum, ella tíðliga komandi árið. Hartil verður eisini arbeitt við at fáa vinardystir móti Íslandi í lag.

Endaligi landsliðshópurin hjá føroyum, er annars hesin:

Margit Joensen, Mjølnir
Alvilda Ólavsdóttir, Fredriksberg Volley
Juanna Joensen, Åbyhøj
Helen á Lakjuni Jacobsen, Fredriksberg Volley
Sólgerð Henriksen, Dráttur
Gudrid Nolsø, TB
Ingun Midjord, TB
Herborg á Mýruni, Dráttur,
Tina Jacobsen, Mjølnir
Anna Müller Jacobsen, Mjølnir
Karin Mikkelsen, SÍ.
Marjun Kalsø, Mjølnir

# Høgni og Helgi kappast um danska meistaraheitið fyri lið



*Helgi Winther Ols en tekur saman við Høgna Øster lut í kappingini um danska meistaraheitið*

**Eftir tvey umfør liggur felagið hjá føroyingunum á einum samlaðum triðja plássi**

FIMLEIKUR
*Páll Holm Johannesen*

Seinasta vikuskiftið kappaðust teir báðir, Høgni Øster og Helgi Winther Olsen, fyri fimleikafelagið AIG úr Álborg um danska meistaraheitið fyri lið í elitudeildini.

Kappingin er skipað í fýra umførum, og tvey tey fyrstu umførini eru farin afturum. Tað hevur gingið eitt sindur misjavnt hjá felagnum hjá Høgna og Helga Í samlaðu støðuni liggur AIG á triðja plássi í samlaðu kappingini.

Tey bæði fremstu liðini, Gefion og VIK, liggja so mikið frammanfyri AIG, at tað neyvan verður meir til eitt samlað triðja pláss hjá Helga og Høgna.

Í seinasta umfarinum luttók Helgi W. Olsen í ringum, barr og lopi, meðan Høgni luttók í kappingini á gólvi.

Næsta umfar í kappingini um danska meistaraheitið fyri lið verður 10 mei, og tað er rættiliga óheppið, tí tað er sama dag, sum FM verður í Føroyum. Sum vit skilja á lagnum, so ætlar Helgi sær at luttaka í FM, meðan Høgni fer at kappast fyri AIG.

Samlaða støðan eftir tvey umfør:

| | |
|---|---|
| Gefion = | 280,85 |
| VIK = | 267,05 |
| AIG = | 251,30 |
| NGF = | 241,20 |

# Skúla FM 2003 í frælsum ítrótti

**Frælsur Ítróttur Føroya skipar leygardagin 17. mei fyri stórari kapping í frælsum ítrótti fyri skúlabørn á Svangaskarði.**

SKÚLA-FM
*tíoðindaskriv*

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Gentur & Dreingir | 1. Flokkur | 60 m | 600 m | longdarlop | Kúlustoyt |
| Gentur & Dreingir | 2. Flokkur | 60 m | 600 m | longdarlop | Kúlustoyt |
| Gentur & Dreingir | 3. Flokkur | 60 m | 600 m | longdarlop | Kúlustoyt |
| Gentur & Dreingir | 4. Flokkur | 60 m | 600 m | longdarlop | Kúlustoyt |
| Gentur & Dreingir | 5. Flokkur | 80 m | 800 m | longdarlop | Kúlustoyt |
| Gentur & Dreingir | 6. Flokkur | 80 m | 800 m | longdarlop | Kúlustoyt |
| Gentur & Dreingir | 7. Flokkur | 100 m | 800 m | longdarlop | Kúlustoyt |
| Gentur & Dreingir | 8. Flokkur | 100 m | 800 m | longdarlop | Kúlustoyt |
| Gentur & Dreingir | 9. Flokkur | 100 m | 800 m | longdarlop | Kúlustoyt |
| Gentur & Dreingir | 10. Flokkur | 100 m | 800 m | longdarlop | Kúlustoyt |

Kappingin, ið er nevnd Skúla FM 2003, er skipað sum ein einstaklingakapping í ymsum greinum inna frælsan ítrótt. Allir skúlar í Føroyum kunnu senda eina gentu og ein drong í hvørjum floksstigi til hvørja grein í kappingini.

Fyrireikararnir hava valt út ymsar greinir innan frælsan ítrótt. Tveir teinir eru, ið skulu rennast umframt longdarlop og kúlustoyt. Greinirnar verða hesar:

Skúlarnir mugu sjálvir standa fyri úttøkuni av teirra umboðum. Frælsur Ítróttur Føroya vónar, at møguleikin fyri at luttaka í Skúla FM fer at økja um áhugan fyri at gera frælsa ítrótt í fimleikatímunum, bæði millum næmingar og lærarar.

Skúla FM 2003 er partur av menningarætlanini hjá Frælsum Ítrótti Føroyum. Endamálið við kappingini er at vekja áhuga fyri frælsari ítrótt umframt at geva føroyskum skúlabørnum høvi at kappast móti hvørjum øðrum.

Um tað ikki ber til hjá lærarunum sjálvum at møta við børnunum úr teirra skúla á Svangaskarði 17. mei, ber eisini til at lata foreldur verða leiðarar í samband við kappingina. Samstundis vóna fyrireikararnir, at foreldur, vinir og floksfelagar hjá luttakarunum fara at seta sín dám á tiltakið við at stuðla teirra floksfeløgum kappingardagin.

Innbjóðingar eru sendar út til allar fólkaskúlar í landinum, og fyrireikararnir vóna, at undirtøkan verður góð. Freistin hjá skúlunum at boða frá luttøku er fríggjadagin 2. mei. Tiltakið verður eftir ætlan afturvendandi á hvørjum ári.




